## Mentamálaráðið

Endurlýsing

# Tíðaravmarkað starv sum einalærari í Tjørnuvík

Starvið sum einalærari í Tjørnuvíkar skúla verður lýst leys av nýggjum, orsakað av at ov fáar umsóknir vóru til starvið. Starvið er fulltíðarstarv og tíðaravmarkað skúlaárið 2009/2010.

**Um starvið**
Einalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur meginpartin av undirvísingini í skúlanum.

**Søkt verður eftir einalærara, sum**

- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 13. juli 2009 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráð
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um størvini, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50
Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

## Mentamálaráðið

Endurlýsing

# Tíðaravmarkað starv sum lærari í Koltri

Eingin umsókn var til starvið sum lærari í Koltri, og tí verður starvið lýst leyst av nýggjum. Starvið er fulltíðarstarv og tíðaravmarkað frá 1. august 2009 - 31. juli 2010.

**Um starvið**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum. Í Koltri eru 2 næmingar skúlaárið 2009/10.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**

- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt
- skal hava regluligt samstarv við ein størri skúla í kommununi

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Um eingin lærari søkir starvið, verður umsøkjari, ið ikki hevur fólkaskúlalæraraútbúgving, settur í starvið.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við prógvi, C. V. o.ø skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 13. juli 2009 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til**:
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Janus Jensen, undirvísingarleiðara, tlf. 306500.

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn · Telefon 35 50 50
Telefax 35 50 55 · e-postur.: mmr@mmr.fo

# Journalleiðari

## til Fjarskiftis-, Post-, Elveitingar-, Tryggingar- og Kappingareftirlitið

Søkt verður eftir journalleiðara trý kvarta tíð til Fjarskiftis-, Post-, Elveitingar-, Tryggingar- og Kappingareftirlitið, til setan skjótast gjørligt.

Eftirlitini halda til á Skálatrøð 20 og eru skipað sum stovnar undir Vinnumálaráðnum, við felags stjóra og felags skrivstovuhaldi. 13 fólk starvast á eftirlitunum. Harumframt eru ráðgevar knýttir at stovnunum.

**Arbeiðið**
Arbeitt verður í løtuni við at taka í nýtslu nýggja journalskipan, við heitinum 360°.

Tú kemur at hava ábyrgdina av íverksetanini og framhaldandi umsitingini av hesi skipan, eins og tú kemur at taka lut í øllum vanligum skrivstovuarbeiði á stovnunum.

Starvsfólkini á teimum ymsu eftirlitunum arbeiða í ávísan mun við tvørgangandi uppgávum innan ymsu økini, og kemur tú at starvast saman við dugnaligum starvsfeløgum í einum óformligum starvsfólkaumhvørvi, har avbjóðandi uppgávur verða loystar.

Møguleikar eru fyri at luttaka á viðkomandi skeiðum eins og at taka viðkomandi eftirútbúgving.

**Førleiki**
Umsøkjarar skulu hava skrivstovuútbúgving ella royndir, sum kunnu javnsetast við skrivstovuútbúgving. Umsøkjarar við hesum royndum og kunnleikum hava fyrimun:

- royndir innan journalføring
- royndir innan almenna umsiting,
- góður kunnleiki til edv á brúkarastøði
- góður kunnleiki til føroyska málið

**Setanartreytir**
Setunartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini. Um tú ynskir nærri upplýsingar, er tú vælkomin at seta teg í samband við: Súsannu Leo, ráðgeva, tlf. 356025, teldupost susanna.leo@fse.fo

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

*Fjarskiftiseftirlitið*
*Skálatrøð 20*
*Postboks 73*
*FO-110 Tórshavn*

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. august 2009.

FJARSKIFTIS EFTIRLITIÐ
TELECOMMUNICATIONS AUTHORITY

# Bátur til sølu

Tresfjord 31, Flybridge.
Motororka: 2 x 200 Volvo Penta.
**Tlf. 216003**

Lesið Sosialin - so eru tit við